Leygardag
við SV- og ÚF-skránni
"ÚR LUFTINI"

Dimmalætting

7 kr.

NR. 61 • Týsdagur 31. mai 1994 • 117. árgangur • Tlf. 11212

Føroya Oljuídnaður sambindingarlið millum føroysk áhugamál og Western

- Tað er ikki okkara uppgáva at peika nakran ávísan út, men at gera vart við teir møguleikar, vit hava at bjóða Western, sum síðan skal gera av, um okkara tilboð passa við teirra arbeiðslag, sigur Magni Arge, formaður í Føroya Oljuídnaði

PÓL Á KLETTI

Loyvini hjá Western at gera seismiskar kanningar á føroyskum sjóøki eru galdandi frá 1. juni og tvey ár fram, og ætlandi í næstu viku kemur seismikkskipið hígar.

Føroya Oljuídnaður umboðar alla ta vinnu, sum áhuga hevur fyri olju og kanningum í tí sambandi. Sambært sáttmálanum við Western kunnu føroyingar venjast umborð á skipi teirra og á høvuðsskrivstovuni í London eins og Western í teim førum, tað er gjørligt hevur bundið seg til at nýta føroyska tænastu. Føroyingum stendur í boði á jøvnum føti við aðrar at søkja um arbeiði um borð skipi hjá Western.

- Tað er í fyrstu atlogu limirnir sjálvir, sum skulu bjóða seg fram at vera Western til tænastu. Annars fer Føroya Oljuídnaður at vera sambindingarlið millum okkara innanhýsis ídnað og tann útlendska, sigur Magni Arge, formaður í Føroya Oljuídnaði.

Tað er avmarkað, hvat føroyingar kunnu fáa burturúr í fyrstu atlogu, tí talan verður bert um tað eina skipið við 35-40 monnum, sum skal gera kanningar í nakrar mánaðir.

- Í øllum førum ræður um at vera tilbúgvin. Tí skipaði Føroya Oljuídnaður í farnu viku fyri skeiði fyri vinnulívsfólki, har danskur serfrøðigur innan oljuídnað legði lag á, og har útgangsstøðið var hugsunarháttur hjá oljufeløgunum, og hvørjari arbeiðsmegi tey disponera yvir, setan av fólki, tá tey finna sær samstarvsfelagar o. s. fr. Áður hava vit havt bretskar serfrøðingar, og vit vóna, at fáa fólk frá norsku oljuvinnuni hígar í næstu framtíð, sigur Magni Arge.

Nógv av okkara vinnulívsfólki kann brúkast í oljuvinnuni. Tey tørva bert eina umskúling. Men prísurin í oljuvinnuni er í løtuni lágur og tí minni virksemi og harðari krøv at fáa alt fíggjarliga at hanga saman.

- Sjálvt um ein hevur førleikan, er ikki lætt at sleppa upp í part nakrastaðni. Annað er tá talan er um oljuvinnu á okkara egna øki. Tá kunnu vit frá myndugleika síðu krevja, at føroysk arbeiðsmegi verður nýtt. Tað avgerandi er, at ein í góðari tíð fyrireikar seg tá avbjóðingarnar koma. Og skuldi tað hent seg, at tær ikki koma, hevur ein einki skeivt gjørt, at kanna eftir, hvussu oljuídnaðurin virkar, tí hann er í dag ein av heimsins kravmiklastu handilsvinnum, sigur Magni Arge.

Hann sigur, at Føroya Oljuídnaður mestsum hevur fingið avtalu upp á pláss við Western um at hava ein fund við limum í FOI í juni mánaði.

Mynd: Diml./Thomas

Magni Arge: - Tað avgerandi er, at ein í góðari tíð fyrireikar seg tá avbjóðingarnar koma. Og skuldi tað hent seg, at tær ikki koma, hevur ein einki skeivt gjørt, at kanna eftir, hvussu oljuídnaðurin virkar, tí hann er í dag ein av heimsins kravmiklastu handilsvinnum

Teir triggir, Bergur Wardum, vitni, Søltoft Madsen, advokatur, og Dan Klein, blaðstjóri, eru ikki lidnir við sorinskrivaran - og hinar, enn

Fútin stevndur

Nú eru teir allir stevndir, sorinskrivarin, Joen H. Andreasen, setti dómarin, Jes Schiøler, løgreglufulltrúin, Michael Bolsen, og Mogens Nepper Christensen, fúti. Teir báðar seinastu stevndi Bergur Wardum hósdagin 26. mai. Bergur Wardum stevnir fyri bakbit og æruskemd.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Sakarmálið, sum Joen H. Andreasen, sorinskrivari, á sinni setti móti blaðstjóranum á Oyggjatíðindum, Dan Klein, tykist ongan enda fáa. Eftir at Føroya Rættur dømdi blaðstjóran sekan í útspilling mótvegis sorinskrivaranum, hevur høvuðsvitnið hjá Dan Klein stevnt bæði sorinskrivara, dómara, løgreglufulltrúa og at enda eisini sjálvum fútanum.

Orsøkin til at høvuðsvitnið hjá Dan Klein, Bergur Wardum, stevnir fyri bakbit og æruskemd, er niðurstøðan í dóminum, sum Dan Klein fekk fyri at spilla sorinskrivaran út. Bergur Wardum sigur, at dómarin, Jes Schiøler, valdi at siggja púrasta burtur frá vitnisfrágreiðingini hjá sær.

Tað gjørdi hann út frá útalilsunum hjá sorinskrivaranum um, at eg lívdi meg so inn í málið, at eg ikki var eftirfarandi, ella kanska skizofrenur, sigur Bergur Wardum.

Tá Schiøler dømdi sum um B. Wardum var skizofrenur, og ákæruvaldið hevur kært dómin móti Dan Klein við kravi um harðari revsing, og út frá somu premissum, sum Dan Klein varð dømdur eftir, metir Bergur Wardum allar vera sekar í bakbiti og æruskemd.

Arni Olsen, sálarlækni, hevur annars kannað Berg Wardum. Niðurstøðan er, at Bergur hvørki er skizofren ella svakur.

Dan Klein, blaðstjóri, sigur í stuttari viðmerking, at spurningurin er um frælsið hjá fjølmiðlum at nýta vitnir ikki er sett uppá spæl eftir dómin móti sær. Hann spyr hvussu tiðindafólk kunnu føla seg trygg, tá dómari bara kann skuldseta vitnir fyri at vera svøk.

Tað eydnaðist ikki at hitta fútan áðrenn blaðið fór til prentingar.

Klovningur ein liður í ping-pong spæli

Boðini um at sleipa skipið úr Havn til Fuglafirðar komu úr Fuglafirði.

BEATE L. JENSEN

Sunnunáttina kom norska skipið Thor Bass á Fuglafjørð, loysti Klovning, sum lá bundin uttan á Roc Amadour við keiina, og fór avstað við honum.

Eitt partafelag í Fuglafirði, Pf. Boðasteinur, keypti herfyri bæði skipini, sum høvdu ligið við bryggju í Havn í langa tíð.

Vaktarmaðurin á keiini í Fuglafirði spurdi seg fyri hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, hvat gerast skuldi. Tá eisini løgreglan kom uppí, gav Vaktar- og Bjargingartænastan Tjaldrinum, sum um hetta mundi lá á Skálafjørðinum, boð um at steðga norðmanninum.

Tjaldrið kom tíðliga sunnumorgunin fram á Thor Bass, sum tá lá stillur í Djúpunum. Hann var annars á veg norður eftir.

- Neyðugt var ikki at gera so nógv burturúr, sigur leiðarin á Vaktar- og Bjargingartænastuni, Jóhan Ziskason, við *Dimmalætting*, tí stutt frammanundan hevði norska konsulátið í Havn heitt á norðmannin um at steðga og koma á Havnina.

Hetta gekk friðarliga fyri seg. Norðmaðurin - við Klovningi uppá sleip. - vendi og fylgdist við Tjaldrinun til Havnar.

Málið kom í Rættin, har frágreiðing var givin, og sunnukvøldið legði Thor Bass aftur frá landi við kós móti Noreg - aftur við Klovningi uppá sleip.

Orsøkin til, at norska skipið ikki boðaði frá, at tað kom á Fuglafjørð hesa nattina og fór avstað við Klovningi í bølamyrkri, er, at norðmenn ikki vildu skapa meiri øsing enn neyðugt var.

Hetta er eitt sera flokt mál, tí upprunaliga Jóðaði, at Thor Bass hevði stolið Klovning úr Fuglafirði, har eitt reiðarí, ið keypt hevði Roc Amadour fyrr í hesum mánaðinum, eisini hevði fingið Klovning. Hann skuldi nýtast sum eykalutir til Roc Amadour.

Í Rættinum sunnudagin kom fram, at eitt felag, Pf. Vest Fish, átti Klovning. Í nevndini eru Jens Eli Ellefsen, Mortan Carlsson og ein norðmaður. Felagið hevði gjørt av at selja norska nevndarliminum bátin, og tí lá Klovningur á Havnini í langa tíð.

Síðani heittu menn í Pf. Boðasteini, sum keypt høvdu Roc Amadour og Klovning stutt frammanundan, á Vaktar- og Bjargingartænastuna um at fáa okkurt av vaktarskipunum at sleipa bátarnar til Fuglafirðar.

- Hesum játtaðu vit, sigur Jóhan Ziskason, leiðari.

- Tað var ikki í okkara tonkum, at fuglfirðingar ikki áttu nakað í tí eina bátinum, Klovningi, og tí gingu vit áheitan teirra á møti.

Dimmalætting skilir á øðrum keldum, at ein partur av søguni er, at tað er landsstýrið ella ein landsstýrismaður, ið lovaði fuglfirðingum Klovning.

Hetta kemst av, at tá Klovningur í sínari tíð skulu keypast, skuldi ein franskur banki figgja keypið. Síðani skuldi landsstýrið fáa tann peningin.

Men av tí at lánið ongantíð kom uppá pláss, gingu franskmenn frá sínari avtalu.

Hetta merkti, at landsstýrið ongantíð fekk sín pening fyri bátin. Og tá landsstýrið ongantíð hevur fingið peningin, kann tað hava verið hugsan hjá onkrum landsstýrismanni, at so mátti tað vera landsstýrið, ið átti bátin.

Men soleiðis er tað bara ikki. Landsstýrið eigur eitt krav móti bátinum eins og allir aðrir kreditorar.

Sjúkrabilatænastan megnar framstig

16 mans hjá sjúkrabilatænastuni fingu fríggjakvøldið prógv »medicinsk deligering som ambulancepersonale«. Hesir menn eru nú góðkendir at taka sær av øllum tólum og allari útgerð í sjúkrabilinum.

DIA MIDJORD

Vit eru frammalaga, tá tað snýr seg um sjúkrabilatænastu, tað kunnu vit føroyingar av røttum erpa okkum við. Fyri fyrstu ferð í Føroyum fingu 16 mans hjá sjúkrabilatænastuni prógv á samkomu fríggjakvøldið í Hornahúsinum.

Jógvan Jensen, leiðari av sjúkrabilatænastuni, sigur við Dimmalætting, at hann, saman við einum korpslækna og 1. hjálparinstruktøri, hevur staðið fyri eini innanhýsis útbúgving av sjúkrabilafólkunum.

Henda útbúgvingin byrjaði tá Sjúkrabilatænastan varð sett á stovn. Fyrst vóru nøkur skeið, har uppfrískað varð tað sjúkrabilafólkið hevði tikið. Síðani bleiv meira kjøt koyrt uppá, og í dag er sjúkrabilafólkið komið uppá fyrsta trinið á stiganum.

Ábyrgdarhavandi læknin á sjúkrabilatænastuni, Hans Jacob Simonsen, handar her einum av sjúkrabilafólkunum prógv. Í miðjuni sæst Jógvan Jensen, leiðari av Sjúkrabilatænastuni *Mynd: Diml./Jens Kr. Vang*

- Vit hava nú fingið lagt ein grundarstein, sum vit fara at byggja meira uppá, sigur leiðarin av Sjúkrabilatænastuni.

- Til ber at útbúgva fólkið enn meira, nú nærum allir hava fingið hetta prógvið, sigur Jógvan Jensen.

Hetta er fyrstu ferð í Føroyum, at sjúkrabilafólk hava fingið hetta prógv. Hesir menn eru nú góðkendir at taka sær av øllum tólum og allari útgerð í sjúkrabilinum.

Danir eru ikki komnir so langt við simun sjúkrabilafólki, men arbeitt verður fram móti hesum í Danmark.

Í BLAÐNUM Í DAG

Fyrsti FM-róðurin rógvin

67 batsmanningar luttóku í fyrsta FM-róðrinum á Norðoyastevnu leygardagin. Og mest minnisríka løtan hesaferð var, tá høvuðsdómarin skeyt róðurin av hjá gentunum, bert 200 metrar frá málinum.

Patrúljukappingin hjá KFUM-skótunum

Seinasti partur av landspatrúljukappingini hjá KFUM-skótunum í Føroyum var í skótadeplinum á Selatrað um hvítusunnuna, 20.-23. mai.

Fylkingarnar nóg nógvar undirskriftir

Eftir øllum at døma fáa tær báðar fylkingarnar, sum stilla upp til komandi løgtingsval, nóg nógvar undirskriftir frá veljarum at fáa gódkenning sum flokkur. Verkamannafylkingin hevur nóg nógvar, Frælsisfylkingini vantar fáar.

HB vann granna-uppgerð í Gundadali

B36 noyddist fyrir fyrstu ferð í ár at bita í súra eplið, tá mótstøðuliðið HB vann greiðan 3-1 sigur í Gundadali. Og á Eiði megnaði GÍ við tógvið stríð at fáa bæði stigini til høldar í einum 1-0 sigri á EB/Streymi.

Leif Mohr handlar við umfatandi telduspølum

Milliarda stórfyritøkan, Virgin Entertainment, er nú komin á føroyska teldumarknaðin. Í hesum døgum fer Leif Mohr undir at selja væl kendu og nógv útbygdu telduspølini hjá »Virgin Entertainment«.

Kendur myndamaður til Føroya

Fyrst í august mánaði kemur kendi danski myndamaðurin, Per Folkver, á vitjan í Føroyum. Folkver hevur givið nógvar myndabøkur út, og hevur annars undirvist í myndatøku. Eina bók hevur hann gjørt um danskar gleðigentur.

Tey vaksnu fáa eisini høvi at planta trø í Kollafirði

Herfyri tók Kollafjraðar kommuna stig til at planta trø í Beitinum.

Uppgávan varð litin skúlanum og dagrøktini at skipa fyri. Og undirtøkan varð beinanvegin góð. Eini 300 børn - dagrøktarbørn, skúlabørn og børn annars - plantaðu trø.

Kollafjarðar kommuna ætlar at víðka økið í Beitinum og býður nú eisini vaksnum fólkum, ið áhuga hava at planta trø har.

Tey, ið áhuga hava, kunnu møta í Kollafjarðar skúla mánakvøldið 6. juni kl. 19.00.